

# Danmark fór til høgru

**Danmark tók eitt risalop til høgru á Fólkatingsvalinum. Vinstra og Danski Fólkaflokkurin vunnu stórsigur. Men hjá Anders Fogh Rasmussen standa truplar stjórnartingingar fyri framman. Pia Kjærsgaard skal ikki hava ov stóra ávirkan, men hon verður ikki til at koma uttanum.**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam, Keypmannahavn*

Lagið var gott á ferjuni Sjælland týskvøldið, har Vinstra hátíðarhelt søguliga valsigurin, sum gav flokkinum 56 fólkatingssessir. Við rungandi fagnarrópum tóku tey fleiri hundrað vinstrafólkini móti formanninum, tá hann trein á pallin at takka fyri stuðulin í valstríðnum.

- Eg fegnist um álitið, sum er víst mær og Vinstra. Eitt álit, sum eg fari at gera mítt ítarsta at liva upp til. Eisini tey, sum hava tapt her í kvøld, skulu vita, at eg fari at verða forsætisráðharri fyri øll, segði Anders Fogh Rasmussen við ovurfegnu viðhaldsfólkini, sum svaraðu aftur við at skjóta propparnar av sjampagnufløskunum.

Flokkurin yvirhálaði Socialdemokratarnir fyrstu ferð síðani 1920, og saman við hinum borgarligu flokkunum, Konservativa, Kristiliga og Danska Fólkaflokkinum hevur nýggi forsætisráðharrin ein stóran meiriluta aftanfyri seg.

Tá teir fýra føroysku og grønlendsku fólkatingslimirnir ikki eru taldir við, hevur borgarligi vongurin 98 sessir og vinstravongurin 77.

Drotningin lat í gjár Anders Fogh Rasmussen upp í hendur at skipa nýggja stjórn, eftir at Poul Nyrup Rasmussen hevði boðað henni frá, at stjórnin leggur frá sær.

### Truplar tingingar

Eingin veit, hvussu nýggja stjórnin í Danmark fer at síggja út. Anders Fogh fór í gjár undir tingingar við flokkarnar, fyrst og fremst teir konservativu, sum við vissu verða við í nýggju stjórnini. Tað er ikki sannlíkt, at Danski Fólkaflokkurin við Piu Kjærsgaard sleppur upp í stjórnina, og somuleiðis er óvíst, hvussu verður við Kristiliga Fólkaflokkinum.

Tað mest sannlíka er, at Vinstra og Konservativu skipa minnilutastjórn, men Pia Kjærsgaard fer at krevja týðilig fingramerki á politikkin — fyrst og fremst útlendingapolitikkin — fyri at styðja stjórnini. Og nakað av ávirkan skal hon hava, um metast skal eftir góða úrslitinum hjá flokkinum. Flokkurin fekk eina framgongd uppá níggju fólkatingssessir og situr nú sum triðstørsti flokkur við 22 sessum í fólkatingssalinum.

Anders Fogh skal ikki rokna við nógvum stuðuli frá vinstravonginum. Socialdemokratarnir, Sosialistiski Fólkaflokkurin og Eindarlistin fara at gera alt, teir eru mentir, at koppa stjórnini skjótast gjørligt.

### Ótrygg støða

Tað er sostatt langt frá nøkur trygg politisk støða, sum Danmark er í eftir valið týsdagin. Anders Fogh Rasmussen hevur lovað nógv í valstríðnum, og veljararnir fara at krevja av honum, at hann heldur mongu lyftini.

Útlendingapolitikkurin skal herðast, bíðiraðirnar til sjúkrahúsini skulu burtur, tey gomlu skulu hava betri heimarøkt og fleiri røktarheimspláss, og barnafamiljurnar skulu hava longt barsilsfarloyvi. Samstundis hevur Anders Fogh lovað, at skatturin ikki skal hækkast í hansara tíð sum forsætisráðharri.

Lyftini eru stór og gylt, og vónirnar fyri veljarunum upp aftur størri. Anders Fogh Rasmussen hevur vunnið fyrsta slagið, men tað fara at koma nógv onnur í tíðini, sum kemur.





# Bilar

Nr. 226 • hósdagur • 22. november 2001 • 75. árg.



*Instrumentborðið er heilt nýtt og sera arbeiðsligt fyri bilføraran*

# Nýggir Volvo lastbilar á marknaðin í 2002

**Síðst í oktober var verkførarin á lastbiladeildini hjá VR Bilum, Torleif Nón, saman við 135 øðrum lastbilaumboðum í Gøteborg, tá nýggju FH og FM røðirnar av Volvo lastbilarnir vóru avdúkaðir.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Torleif Nón, verkførari á lastbiladeildini hjá VR Bilum, var í Gøteborg tá nýggju Volvo lastbilarnir vóru sýndir fram fyrstu ferð*

Tá Volvo avdúkar nýggjar bilar, er tað ofta við eini stórari leiksýning. Tá nýggju FH og FM lastbilarøðirnar vóru sýndar fram í oktober, var onki undatak. Har vóru nógvir artistar sum sýndu fram síni kynstur, og á stórskíggja sást ein tyrla koma við einari byngju hangandi undir sær. Tá tyrlan steðgar og skal lora byngjuna niður, kemur ein ein Volvo FH 12 niður úr loftinum, og lendir á gólvinum millum borðini har áskoðarnir sótu og ótu. Hetta kom heilt óvart á teir, tí hetta var ein spildurnýggjur bilur, sum teir ikki høvdu sæð áður.

### Volvo FH og FM

Talan var um nýggjastu Volvo FH12, FM9 og FM12 lastbilarnar. FH 12 fæst við 12 litur motorum frá 340 til 500 hk., og FM9 fæst við 9 litur motorum frá 260 til 380 hk. FM 12 fæst við 12 litur motorum frá 340 til 420 hk. Næsta ár kemur ein nýggjur 16 litur motorur. Fýra ymiskir gearkassar verða at velja ímillum: Powertronic er ein heilautomatiskur gearkassi. Geartronic er ein 14 trins gearkassi. I-shift er ein heilt nýggjur heilautomatiskur ella manuelt stýrdur elektroniskur gearkassi. VT er ein gearkassi ið hevur kaðalsamband ístaðin fyri stengur.

### ABS og ESP

Allir Volvo lastbilar við luftfjaðraskipan hava skivubremsur á øllum hjólunum. Eisini hava teir elektroniskt stýrdan retardara, ið kann aktiverast automatiskt tá man bremsar, og heldur ferðina sum bilførarin hevur sett hann til í undanbrekku. Við tað at ABS bremsur eru standard, fæst bilurin eisini við ESP (Elektronisk Stabilitet Program). Við hesi skipan fær bilførarin hjálp í torførum umstøðum, tí skipanin regulerar til dømis bremsukraftina og motorkraftina eftir tørvi. Hetta er við til at bøta munandi um trygdina á vegunum.

### Til Gøteborg í januar

Hetta er bert nakað av tí nýggjasta sum Volvo lastbilarøðirnar koma við í næstum. VR Bilar skipa fyri einum túri til Volvo miðstøðina í Gøteborg í januar mánaða. Tey sum hava áhuga, kunnu venda sær til VR Bilar, at fáa meira at vita um túrin. Annars verður eitt skriv sent út til allar lastbilakundarnar, har møguleiki er at tekna seg.





*Volvo FH 12 við heilt nýggjum designi. FH røðin fæst við fýra ymiskum førarahúsum*





*Volvo FM 12, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1998, kemur næsta ár við heilt nýggjum designi*